# Farstøðin fer…



*Mikið rok hevur verið á Farstøðini seinastu dagarnar – og um fáar dagar er 1300 fermetra stóra høllin fullkomiliga javnað við jørðina*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Seinastu dagarnar hava menn verið í ferð við at javnað Farstøðina á Eystaru Bryggju í Havn við jørðina. Høllin verður sett uppaftur í Havnardali sum ríðihøll**

FARSTØÐIN
*Eirikur Lindenskov*

Seinastu dagarnar hevur mikil aktivitetur verið á Farstøðini á Eystaru Bryggju í Havn. Menn eru í ferð við at taka niður stóran part av Farstøðini – tann partin, ið hýsti Farmaleiðum hjá Strandferðsluni. Tann parturin av høllini er 1.300 fermetrar.

Høllin verður sett upp aftur í Havnardali, har Føroya Ríðingafelag skal hava hana til ríðihøll.

Tað er fyri at fáa betur pláss til bilar, ið skulu við nýggju Norrønu, sum kemur í næsta mánaði og nýggja Smyril, ið kemur næsta ár, at Tórshavnar Havn hevur gjørt av at víðka um plássið til bilarnar.

Kortini verður valla pláss fyri øllum bilunum, ið skulu við skipunum, tí um bæði skipini liggja við bryggju í senn kann talan verða um einar 1.500 bilar – og teir rúmast so langt frá á bryggjuni.

Virksemi hjá Strandferðsluni hevur verið í bygninginum á Eystaru Bryggju seinastu 12 árini. Tann parturin, ið er sjálv farstøðin til ferðafólk, verður standandi, og nýggja tornið til landgongdina til Norrønu verður í løtuni sett upp.

Bussarnir, ið hava hildið til vestan fyri bygningin, verða í framtíðini eystanfyri.

Nýggja Norrøna kemur á Havnina á fyrsta sinni hósdagin 10. apríl.

# Tarira – eitt nýtt føroyskt kór

**Tarira varð stovnað á vári 2002 og telur 18 sangarar ið teljast ímillum royndastu kórsangarar í Føroyum. Eisini nema flestu sær sangkunnleika á Sangskúla. Kórleiðari er Sunleif Rasmussen**

KÓR
*Tíðindaskriv*



Kórið leggur seg serliga eftir at bera fram nýggjan føroyskan tónleik og renesance tónleik.

Tarira fer at hava tvær várkonsertir fyrst í apríl mánaða, eina í Fuglafirði og tað seinnu í Tórshavn. Á hesum fyrstu konsertum verða í høvðusheitum sangir og verk framførd av føroyskum og norðurlendskum tónasmiðum umframt renesansutónleikur. Tarira er eisini umbiðið at luttaka á Listastevnuni 2003.

**Sangarar:**
**Sopran:** Berghild Poulsen, Joanna Johansen, Arina Bischoff, Unn Paturson, Urd Johannesen.
**Alt:** Píl Reinert, Gunnvør Poulsen, Durita Eliasen, Elspa Samuelsen.
**Tenor:** Peter Niclasen, Hans Debes, Pauli Hansen, Uni Petersen.
**Bass:** Eyðun Eliasen, Høgni Debes, Andrias Petersen, Niels Winther, Fróði Sandoy.

**Navnið:**
Tarira er ein vera í hugaheimi William Heinesens, oftast avmyndað sum ein spælandi genta, hálvur dreymur og hálvur veruleiki. Hon er longsulin og gandurin. Millum annað er hon avmyndað saman við ungum manni, ið spælir fiól fyri henni. Tarira umboðar leik, list og vakurleika og er eyðkend fyri sínar longu og leikandi fingrar.

Fyri nøkrum árum síðani gjørdi Hans Pauli Olsen eina standmynd við íblástri frá Tariru. Standmyndin stendur niðarlaga í viðarlundini í Havn og sæst kóri avmynda framanfyri henni.

**Búmerkið:**
Leikandi fingrarnir á Tariru eru eisini høvuðsmotivið í búmerkinum hjá kórinum. Ein hond við fingrum spílaðum út er sett upp til vangan á persóni so sangurin hoyrist betur. Fingrarnir ímyndað eisini tær fýra høvðusrøddirnar: Sopran, alt, tenor og bass. Saman við tumlinum, sum ein ímynd fyri kórleiðaran, ímyndar hondin ein fugl ið spennir veingirnar út til reiðar at royna flogið.




